# BØNARLØTAN

**JANUAR** **2025** **40. árg.**

***Náðin er nýggj hvønn morgun, stór er trúfesti Tín. Sorgars. 3.23***

## *1. Nýggjársdagur* *Jóh. 1.1-27*




*Natalie mennir samstarv við kvinnurnar*

### PAPUA NÝGUINEA, Kovol
### Natalie og Philip Hansen
### Louis 7, Timon 5, Manuel 1, Salome 1

Vónandi duga vit at lesa kovolmálið í summar. Hóast ósannlíkt, so verði eg kanska liðugur longu í feb.

### Árligu fundirnir í Buli á Signabø

Leygarkv. 4. jan. kl. 20 v. Kvartettini í Betesda.
Sunnukv. 5. jan. kl. 19 v. manskórinum í Ebenezer.
Talarar: Poul Færø, Eyðfinn Reyðberg, John Færø, Arne Simonsen og Jákup N. Olsen.

**KRINGVARPIÐ**
2. feb. kl. 17 Útvarpsmøti, Vitnið, Hvalba

**EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á www.evr.fo)**
Sunnukv..........kl. 21 Kelduvaðið (endursent hóskv kl. 21)
Týskv.............kl. 21 Á torginum (endursent sunnud kl. 12.30)

## *2. Hósdagur* — *Jóh. 1.28-52*

**DANMARK, Kristnastova**
**Ásla og Bárður Norðberg – Andrea 4, Boas 2**

**Susan og Øssur Berghamar**
Vit eru Harranum takksom fyri náði og trúfesti gjøgnum farin ár og ynskja øllum vinum og kenningum eitt signað nýggjár. Vit halda á at stuðla tí týðandi verki, sum fer fram millum fólkið, ið regluliga savnast í Kristnastovu. Eisini tænastan millum sjúklingar og avvarðandi liggur framvegis nógv á hjørtum okkara. Takk fyri samfelag, stuðul og forbønir tykkara. berghamar@kristnastova.dk

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Emma Grace 17, Jónatan 15, Markus 12, Evita 9, Joy 8**
Aftur í ár hava vit vetrarbíbliuskúla fyri skúlabørn fyrstu vikuna í jan. Biðið, at boðskapurin festir rót.

## *3. Fríggjadagur* — *Sálm. 28 og 29*

**SENEGAL, Dakar**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Ryan 15**
Vit vitja suðuri í landinum 3-8. jan. Ryan og Hans Arni hava ongantíð verið har fyrr, men Marion hevur ofta vitjað har. Nú skal

hon hjálpa einum trúboðara at meta um, hvussu langt hon er komin við málinum. Tað tekur tveir dagar, og hava vit so tríggjar dagar til okkum sjálv. Vit ætlaðu at vitja oftari í Guinea, men soleiðis varð ikki. Biðið, at Harrin vegleiðir okkum her.

**ZAREPTA**

## *4. Leygardagur* — *4. Mós. 1.1-25*



**FØROYAR**
**Birgit og Svenning av Lofti**
Vit verða heima í jan. og vitja samkomur og einstaklingar. Vilt tú hava vitjan, ring 212045 (Svenning) ella 212046 (Birgit). 4-6. jan. verða vit í Norðoyggjum: Sunnud. 5. jan. kl. 11 í Hermon, Norðdepli. Minnist son okkara Petur, sum býr á Traðarvegi 34 í Sandavági. Ein stutt vitjan er altíð kærkomin, men ring áðrenn á 228277. Eitt stutt telefonprát gleðir eisini. lofti@olivant.fo

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelsen, Josva 15, Ester 14, Samuel 10**
**– Dora og Niels Pauli Nónstein, Kristina 13**
**– Synnøve og Danjal av Rana, Anna Emilie 10, Lukas 4**

## *5. Sunnudagur* — *Jóh. 2.1-25*

**OM, LOGOS HOPE, DOULOS HOPE, TeenStreet**
Frá 5. jan. verður Elsa í Skorini tríggjar mán. við Logos Hope, sum verður í Trinidad henda mánaðin. So gongur leiðin til Vieux Fort í St. Lucia. Doulos Hope er í Taivan, fyrst í Kaohsiung til

14. jan. og síðani í Hualien restina av jan. Stórur tørvur er á manning til skipini bæði. Birita og John Timothy, trúboðarar í Japan, eru heima í Føroyum í jan. Tey undirvísa m.a. á missiónsskúlanum hjá OM 21. jan., eins og tey eisini tala ymsastaðni í landinum. Frida og Óli Gregersen fara í feb. á Reach missiónsvenjingarskúlan hjá OM í Suðurafrika, har Tanja og Kurt Abrahams nú arbeiða.

## *6. Mánadagur* — *4. Mós. 1.26-54*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**
Sue skal til eftirlit hjá onkologi í USA, og eg skal til Skotlands og Tailands seinni í jan. á málráðstevnu. Vit miðja eftir at geva nakað av Skriftunum út í 2025. Biðið, at Sue fær góð boð, fyri ferð míni og fyri umsetingararbeiðinum.

**MAF-Føroyar**
**Andrias Hansen**
Eg verði nú tríggjar mán. á bíbliuskúla í Onglandi og fari síðani til Hollands at arbeiða sum floglærari.

## *7. Týsdagur* — *Jóh. 3.1-19*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**
Vit hava fyrireikað undirvísing í nýggja árinum. Biðið, at jólaboðskapurin varð til signing fyri alt sorimifólkið. Fyrra lestrarhálva eydnaðist væl. Áðrenn jólafrí undirvísti Carol í matgerð undir primitivum umstøðum, og Poul undirvísti í pre-evangelism.

## 8. Mikudagur 4. Mós. 2.1-34



**GRØNLAND, Nuuk**
**Naalakkap Jiisusip Oqaluffa**
**Hans Sivertsen**

Fyrireikingarnar til legurnar eru byrjaðar. 11. jan. samlast vit í samkomuni at biðja fyri legunum og fyrireika meir. Um onkur umhugsar at koma yvir at hjálpa, eru tit vælkomin at siga frá.

**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

## 9. Hósdagur Jóh. 3.20-36

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Lydia 7**

Vit kenna okkum signað og takka fyri stuðul og forbøn frá trúgvandi og samkomum í Føroyum. Nýggj andlit síggjast millum okkara her; fleiri hava onga samkomubakgrund. Biðið, at vit vísa teimum umsorgan og kærleika og vísa teimum á Jesus.

## 10. Fríggjadagur Sálm 30



**ONGLAND, European Christian Mission**
**Dorit og Simon Marshall**

11-22. jan. vitjar Simon trúboðarar í Ukraina. Hann skal m.a. hava fundir við *Baptist Union*, sum bjóðar til samstarv um at stovna 1000 nýggjar samkomur næstu 10 árini. Visiónin er

stór, samfelagið brotið, men Harrin gevur dirvi og styrki og kann gera tað møguligt. Biðið, at Harrin verjir Simon og teir, ið ferðast saman við honum.

***Í dag fyllir Joy Tuohy 8 ár**

## *11. Leygardagur* — *4. Mós. 3.1-26*



**DANMARK, Kolding**
**Anne og Jan Zachariassen**
Teknmálsbíblian byrjar virksemið í jan., hesa ferð fyrst í Danmark inntil nóg mikið av stuðli er komið inn, tá ið so partur av virkseminum kann flytast til Føroya. Vit takka fyri møguleikar at tæna Harranum ímillum tey deyvu.

**DANMARK, Odense**
**Árni Helmsdal**
Nógv samband er millum føroysku møtini í Odense og aðrastaðni, serliga í Esbjerg. Biðið, at Heilagi Andin virkar og knýtir fólk og hjørtu saman í hesum býum.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

## *12. Sunnudagur* — *Jóh. 4.1-26*



**ONGLAND, Birmingham, Personal Support Matters**
**Claire og Craig Niclasen**
**Rebekah 16, Lydia 14**
Claire: Seinnu helvt av jan. standi eg á odda fyri venjingarskeiði fyri fýra felagsskapir, ið

arbeiða við trúboðan í Evropa. Í feb. verður ráðstevna í Budapest fyri trúboðarar, har eg undirvísi í stuðulsbøn. Biðið fyri fyrireikingunum.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

## *13. Mánadagur* *4. Mós. 3.27-51*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**
Um Gud vil, verða sum vant 4 legur komandi summar. Tær byrja hósd. 26. juni og enda týsd. 22. juli. Harumframt verða legurnar útleigaðar í aug./sept. til kommunalar vælgerðarstovnar, har vit hava ábyrgdina av andaliga partinum. Í fjør var nógvur ísur, so onkur lega mátti styttast, Juvel fekk skaða av at treingja seg ígjøgnum ísin, og vit mundu blivið í uppisetri við olju. Biðið, at Harrin sendir hjálparfólk og fyri øllum smálutum.



**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Gull-Britt og Karsten Hansen**

## *14. Týsdagur* *Jóh. 4.27-54*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen**
Biðið áhaldandi fyri STEVN. Eitt skeið verður nú gjørt fyri hjún, men orsakað av tekniskum avbjóðingum verður hetta uml. tveir mánaðir seinkað. Í jan.-mars er ætlanin at menna tænastuna, so hon røkkur út millum enskitalandi.

**OM, SUÐURAFRIKA, Mamelodi Aids Hope**
**Tanja og Kurt Abrahams**
**Hanna 1**

## *15. Mikudagur* — *4. Mós. 4.1-23*

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Ansa og Arnold Mortensen**
**Ewelina 15**

**Anna og Hans Djurhuus**



Vit ynskja øllum Harrans ríku signing. Samkoman í Malta liggur okkum nógv á hjarta, her koma nøkur trúliga saman til møtini. Biðið fyri samkomuni og verkinum millum føroyingar í Hirtshals og Aalborg og okkum við.

**ATLANTIC MISSION**

Biðið fyri evangeliseringsferð til Hirtshals 11-21. juli. Vit fara í næstum at kunna nærri um ferðina á ungdóms- og øðrum møtum í samkomum kring landið.

**FØROYAR**



- **Elin og Jógvan Jacobsen**
- **Unn og Jógvan Zachariassen**
- **Lis Zachariassen**
- **Annika og Poul Færø**
- **Anna og Óli Steinberg**
- **Maria og Jens Bech**

## *16. Hósdagur* — *Jóh. 5.1-23*



**USA, New Tribes Mission, Alabama**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Eg undirvísi í samkomuni her í Montgomery, havi netfundir við trúboðarar og leiðarar, og eg luttaki eisini í einum bíbliuskeiði á netinum. Luttakararnir búgva í Kalifornia, Tailandi og Singapor.

**Atlantic Mission, Juvel II**
**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði, Terji 12, Petra 11**

*Í dag fyllir Hadassa Christiansen 14 ár

## *17. Fríggjadagur* — *Sálm. 31*



**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 14, Tabita 11, Debora 9, Natan 6**
Vit gleðast um áhugan hjá ungum at koma við til *Reach*, sum verður 28-30. mars í Onglandi, og at tað er fullteknað. Biðið fyri næmingunum á North Cotes College: Malvinus í Gong, Teitur Isaksen, Remi R. Rasmussen og Silas Jacobsen.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

## *18. Leygardagur* *4. Mós. 4.24-49*



**ITALIA, Molise**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Trisha 12, Emma 8**
Biðið, at Gud gevur okkum vísdóm og tol, sum vit arbeiða við at keypa bygning ella hølir til samkomuna og alt virksemið.

**SVEIS, Versoix, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 11, Micah 11**
Vit takka fyri tey átta fólkini, ið vórðu doypt, fyri vøkstur í tænastuni millum børn og fyri eyka hølir til hesa tænastuna. Eisini vóru nóg nógvir sjálvbodnir lærarar. Biðið, at Gud framvegis leiðir fólk í hesum økinum nærri Sær.

## *19. Sunnudagur* *Jóh. 5.24-47*



**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**
Biðið, at vit áhaldandi vaksa í trúnni, so at vit betur kunnu vegleiða trúboðarar kring heimin.

**TURKALAND, Istanbul (fjararb.)**
**Annika og Stephen Everett**
Mong vórðu eggjað, tá ið Annika vitjaði í Istanbul, eitt nú samverkafólk á bíbliubrævaskeiðnum og samkoman. Biðið fyri teimum, tí fleiri falla frá, eftir at tey eru doypt. Nú fáa aftur fleiri enn 450 fólk um vikuna pakkar við NT. Takk fyri bønir og stuðul í farna ári, og Harrin signi tykkum í nýggja árinum.

## *20. Mánadagur* *4. Mós. 5.1-31*

**INDONESIA**
**Krissy og Daniel Hansen**
**Zephaniah 4, Selah Rose 1**

Vit hava toymissamrøður fyri framman, og torførar avgerðir skulu takast. Biðið um vísdóm og Guds greiðu leiðbeining í okkara tænastu.

## *21. Týsdagur* *Jóh. 6.1-21*

**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 14, Leah 11, Abigail 6**



Vit leita eftir høli í grannalagnum at hava møti í, tí vit sleppa bert at brúka verandi bygning eina ferð um mánaðin. Nú samkoman veksur, er tørvur á, at fleiri taka ábyrgd og luttaka í samkomutænastuni. Okkum tørvar eisini vísdóm til avgerðir, so Jóhannis finnur rætta arbeiðið, ið kann gera fíggjarligu støðuna hjá familjuni haldførari.

## *22. Mikudagur* *4. Mós. 6.1-27*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 13**

Enn vita vit einki um pinkubarnið, ið vit skulu fáa til fosturs. Skjótt gevst eitt av starvsfólkunum á skrivstovuni vegna barnsburð. Biðið, at Harrin gevur okkum annað starvsfólk í hennara stað.

*Í dag fyllir Ewelina Mortensen 15 ár

## *23. Hósdagur* *Jóh. 6.22-44*



**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**
Eg rættlesi umsetingar av Ezekiel og av 2. Mós. Umsetararnir hava arbeitt við hesum, síðani teir vóru ungir. Nú eru teir allir upp ímóti 80, men halda á enn.

## *24. Fríggjadagur* *Sálm. 32*

**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 16, Noah 15, Karis 11, Judah 9, Ethan 6**
Biðið um einleika hjá okkara fýra mengen bíbliulærarum, fyri samkomuni Lele og yngru samkomuni í Bologo, og fyri okkum, sum vit liva, arbeiða og ferðast út frá Goroka. Vit skriva bíbliulærutilfar til mengen samkomuna og arbeiða við lesiførleika og týðing, og vit gleða okkum til at koma aftur til samkomuna. Biðið, at vit megna at hava góða javnvág millum dagliga lívið og tænastuna og halda okkum nær Harranum. Biðið, at trotið á brennievni í PNG batnar.

**PAPUA NÝGUINEA**
**Lili og Brian Poulsen**
**Elliot 8, Jude 6, Evelyn 4, Olivia 1**

## *25. Leygardagur* *4. Mós. 7.1-29*

**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**
Umsetingarráðgevin skal rættlesa 1. Sám. og part av 2. Sám. í feb. Eg dagføri NT, tá ið stundir eru til tess. Ungi umsetarin heldur

fram at arbeiða við 1. og 2. Kong. Sunkaru, ein eldri, trúgvandi maður, fór heim til Harran 21. des. Hann var ein trúfastur, dyggur stuðul í umsetingararbeiðinum. Biðið, at Harrin gevur vísdóm og áhaldni.

## *26. Sunnudagur* *Jóh. 6.45-71*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**
Harrin signaði møtini og tiltøkini í des. Biðið, at tey, ið hoyrdu evangeliið, velja at fylgja Jesusi og uppliva Hansara kærleika.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

*Í dag fylla Salome og Manuel Hansen 1 ár

## *27. Mánadagur* *4. Mós. 7.30-59*

**FILIPSOYGGJAR, Nayba, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen.**
Eg havi júst verið í bygdini Nayba í tilsamans 7 dagar, og nú er Rómbr. liðugt rættlisið. Teir, eg arbeiði saman við, eru eins og eg enn eina ferð mintir á Guds ómáldu náði. Teir hava fingið eitt gott yvirlit yvir Rómbrævið, og tað er ein sonn gleði at hoyra teir tosa um, hvat og hvussu Paulus hevur skrivað til samkomuna har, og hvussu hesir somu sannleikar nú kunnu verða lærdir í fleiri samkomum í ættarbólkinum! Lat okkum takka Gudi og gleðast saman um, at Orð Guds verður lært.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *28. Týsdagur* — *Jóh. 7.1-24*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud (f)**
**Monika og Tim Sharp**
**Hanna 16**

Árliga hungurstíðin er í ættarbólkinum á suðurendanum á Palawan, og svongdin leiðir mong í freistingar. Herfyri komu adventistar til bygdina Naplud, har vit hava búð í nógv ár. Teir bjóðaðu teimum mat og stuðul til skúlagongd hjá børnunum og doyptu síðani 200, sum søgdu seg trúgva teirra boðskapi. Millum tey, ið lótu seg doypa, vóru fleiri, sum søgdu seg trúgva evangeliinum, sum vit hava boðað teimum. Biðið fyri teimum trúgvandi í Naplud, at tey standa sterk í trúnni og ikki falla fyri freistingum.

*Í dag fyllir Emma Grace Tuohy 17 ár

## *29. Mikudagur* — *4. Mós. 7.60-89*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Aron 12, Noah Kristian 11**

Vit eru sera takksom fyri stórfingnu peningagávuna úr Føroyum, og tað er ein framíhjárættur at kunna stuðla fólkinum her í okkara øki. Vit hava hjálpt um 100 húsarhaldum við neyðsynjarvøru, so sum mati, madrassum og teppum. Vit halda á at hjálpa, og seinasti peningurin, ið kemur inn, verður brúktur til at stuðla lokalu samkomunum, so at tær fáa nakað av nýggjum innbúgvi fyri tað, sum fórst í vatnflóðini. Her verður hugsað um hillar og skáp til bøkur og tilfar til sunnudagsskúlaarbeiðið.

**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 15, Nana 13, Louie 11, Rio 5**

Vit hava leingi umhugsað at byrja eitt enskt møti í samkomuni. Okkum tørvar vísdóm og Guds leiðslu.

*Í dag fyllir Petra í Prestgarði 11 ár
*Í dag fyllir Tabita Christiansen 11 ár




| | |
|---|---|
| Útgevari | KBS (Kristniboðssambandið) |
| Blaðnevnd | Róland í Skorini, ábyrgd, Ernst Olsen, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Durita Olsen, Barbara og Ragnar Vest og Sigurð Ó. Vang. |
| Avgreiðsla | Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057 |
| Uppseting | Grafikmaster, tel. 502022 |
| Myndasavn | info@grafikmaster.fo |
| Prent | Føroyaprent, tel. 314555 |
| Teldupostur | prayerservicefo@gmail.com |
| Heimasíða | www.kbs.fo |

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705


©KBS. Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.

## THE VERITAS FORUM
**www.veritas.org**

Í hesi framløguni síggja og hoyra vit enska støddfrøðingin, heimspekingin og gudfrøðingin Dr. John Lennox seta spurningin: *Hevur vísindin dripið Gud?* Við djúphugsni viðger Lennox hugtakið um, hvørt Gud og vísindi eru hvør sítt, ella ikki. Lennox svarar eisini spurningum frá áhoyrarum. Upptøkan er frá University of California, Los Angeles í 2015.

Framløgan er á enskum (88 min.)
*youtu.be/Y6SaNaiW0Jo?si=ig80_tS68MSk3DVG*

## BÓKATÆNASTAN
Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum og Logos Hope.



Bílegging á www.leirkerid.fo
Kráargøta 36 • Klaksvík
Tel. 718191 • leirkerid@leirkerid.fo